# Europearar læra av Føroya Tele

**Fyrireikararnir av stórari europeiskari ráðstevnu um digital sendinet vildu hava umboð fyri Føroya Tele at greiða frá, hvussu felagið hevur útbygt sítt digitala net, og framløgan hjá menningarstjóranum hjá Føroya Tele skapti stóra umrøðu**



*Tróndur Djurhuus hevur í vikuni havt framløgu á stórari europeiskari ráðstevnu um digitalt sendinet. Hann greiddi frá royndunum í Føroyum*

TØKNI
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Fyrireikararnir av stóru DTT-ráðstevnuni, sum hevur verið hildin í estlendska høvuðsstaðnum Tallinn hesa vikuna, høvdu boðið menningarstjóranum í Føroya Tele at hava eina framløgu um digitalt sendinet.

Stívliga 100 luttakarar frá almennum og privatum stovnum og fyritøkum hava verið savnað at viðgera broytingina frá analogum til digitalt sjónvarp í Europa. Ráðstevnan vendir sær serliga til tey eystureuropeisku londini, sum mennast nógv í hesum døgum, men luttakarar verða eisini úr fleiri vestureuropeiskum londum.

Í flestu europeiskum londum verður nú dúgliga skift orð um, hvussu best er at talgilda (digitalisera) sjónvarpssendinetini. Enn eru flestu londini komin stutt á leið, men ES-kommissiónin hevur gjørt av, at øll tey analogu sendinetini í Europa skulu verða sløkt í seinasta lagi í 2012.

### Føroyar spæla við

Í tí stóra prátinum um digitaliseringina kunnu føroyingar eisini verða við, tí Føroyar vóru eitt hitt fyrsta landið, sum fekk talgilt sendinet. Hetta hendi, tá Televarpið varð stovnað.

– Televarpið var eisini fyrsta skipanin, sum var handilslig burturav, og eisini fyrsta fyritøkan av sínum slagi, sum gevur avlop av rakstrinum. Hetta, hóast Føroyar eru sera avbjóðandi sum marknaður við sínum avmarkaða fólkatali og truplu landafrøði, sigur Tróndur Djurhuus, menningarstjóri.

– Við síni serligu samanseting av vanligari og heldur bíligari tøknifrøði og ikki minst teirri serligu føroysku KT-skipanini, sum stýrir rakstrinum, verður Televarpið tí hildið at vera best eydnaða DTT-fyritøkan higartil, sigur hann.

### Vakti ans

Tróndur Djurhuus hevði sína framløgu hósdagin undir heitinum: »Successful Commercial Introduction in a Challenging Environment - DTT in the Faroe Islands«.

Og hendan framløgan fekk sera stóra umrøðu.

– Tað var heilt týðuligt, at tað var nógv størstur áhugi fyri okkara framløgu. Okkara loysn varð nógv umrødd, og fleiri lond vildu hava møguleikan at fáa fleiri upplýsingar. Eg havi eisini havt eitt prát við estlendska mentamálráðharran um okkara skipan, sigur Tróndur Djurhuus.

Umframt Trónd umboðaði Edvard í S. Joensen Føroya Tele, meðan Televarpið varð umboðað av Lailu Hentze.



*– Televarpið var eisini fyrsta skipanin, sum var handilslig burturav, og eisini fyrsta fyritøkan av sínum slagi, sum gevur avlop av rakstrinum. Hetta, hóast Føroyar eru sera avbjóðandi sum marknaður við sínum avmarkaða fólkatali og truplu landafrøði, sigur Tróndur Djurhuus, menningarstjóri í Føroya Tele*

# Vilja vinna pengar uttanlands

**Føroyski telemarknaðurin er so avmarkaður, at skal Føroya Tele halda fram við at vaksa, má fyritøkan fáa fleiri inntøkur uttanlands. Tí hevur felagið keypt seg inn í bretska felagið Telabria**

FØROYA TELE
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Føroya Tele hevur keypt ein part av ensku breiðbandsfyritøkuni Telabria, sum verður mett millum tær fremstu innan tráðleysa breiðbandstøkni.

Í tíðindaskrivinum, sum kom frá Føroya Tele um hetta hósdagin, varð einki sagt um, hvussu stóran part av fyritøkuni Føroya Tele hevur keypt, og hvussu stór upphæddin fyri keypið.

Sambært menningarstjóranum hjá Føroya Tele er orsøkin til hetta, at í løtuni verður arbeitt við modellinum, sum Føroya Tele og Telabria skulu samstarva eftir, og tá tað er greitt ber til at koma við fleiri upplýsingum.

### Inntøkur mugu koma uttanlands

Føroya Tele ger alt meira við at arbeiða á marknaðum uttan fyri Føroyar, og tað er ein greið orsøk til hesa strategi.

– Føroyar eru ein evarska lítil telemarknaður, og Føroya Tele kann ikki vaksa nógv meira á hesum marknaði. Tí hava vit eitt mál, at um nøkur ár skal Føroya Tele fáa munandi inntøkur av virksemi uttanfyri Føroyar, sigur Tróndur Djurhuus, menningarleiðari.

– Vit hava onkrar loysnir í Føroyum, sum er áhugaverdar uttanlands, og vit skulu finna tey øki, har vit eisini kunnu verða við í øðrum londum.

Samstarvið við Telabria er tí eitt stig á ta leiðina, og umframt vónir um at vinna pengar, snýr tað seg eisini um at fáa innlit í nýggja tøkni og finna samstarvsfelagar uttanlands.

– Tað er stuttur vegur frá at vera ein profitabul fyritøka til at steðga upp, um tú ikki hyggur fram í tíðina. Vit royna við nýggja samstarvinum at víðka okkara virksemið á útlendskum marknaði, sigur Tróndur Djurhuus.